

*Við løgarsteinin í Norðradali. Aftast f.v. Andrea, mostir Hannu, Louis við Eiko, Josefina og Óli, mammubeiggi Hannu og abbin Andrias.*
*Fremst: Sanna Apol við lítlu Hannu og mostrini Nordina, sum eisini er umrødd í greinini*

ymiskum slag. Millum annað var hann millummaður, tá ið Silver Spray kom til Føroya úr Hollandi. Hann hevði neyvt samband við Jákup í Stórustovu, sum hevði eisini gott samband út í heim og dugdi væl mál. Tí komu teir at samstarva í handilsviðurskiftum.

Áðrenn FF-blaðið varð niðurlagt, hevði tað eina áhugaverda frásøgn um føroyingar, sum vóru á stórhvalaveiðu við hollendarum í Suðuríshavinum aftaná kríggið. Tá var tað Louis, sum var umboðsmaður í Føroyum.

Norðmenn vóru sera argir inn á hesa veiðu. Louis Apol svaraði aftur, at hetta var øvund um, at norðmenn ikki sluppu framat, tí teir tá eingi hvalskip høvdu. Tað vísti seg eisini, Louis fekk rætt í hesum. Tá ið norðmenn aftur sjálvir fingu møguleikan fyri tí, hildu seg seg ikki aftur við hesi hvalaveiðu.

## Lærdi enskt hjá nonnunum

*Hanna greiðir frá:*

Pápi fór sjálvboðin til Bretlands undir krígnum. Hann var innkallaður av hollendsku stjórnina at koma til Onglands og roknaði sjálvsagt við at fara við einum hollendskum skipi.

Hann var leingi burtur. Eg havi brøv frá honum, sum hann sendi mammu.

Hollendsku skipini høvdu nóg mikið av fólki, og høvdu ikki brúk fyri fleiri. So koyrdu tey hann við einum donskum skipi. Hetta var hann ikki so glaður fyri. Umborð hjá teimum var ikki frítt fyri ólevnaði umborð.

Fyrstu ferð hann fekk feriu, fór hann heim til Føroyar og segði, at hann fór ikki avstað aftur fyrr enn hann visti, at hann slapp við einum hollendskum skipi. Bretar vóru javnan eftir honum at gerast



*Ff.v Systkini Jóhanna, Jákup og Eiko í Skopun. Her hava tey geit*

hermaður hjá teimum, men tað vildi hann ikki. Hann var jú farin sjálvboðin, so ongin kundu krevja hann eftir nøkrum. Hann fór tá at arbeiða í Landshandlinum í Føroyum sum lagursjefur og verður greitt meira frá hesum í seinasta parti av hesi røð.

Hetta dámdi eisini mammu best. Hon var eisini altíð so bangin, meðan hann var burtur. Hann hevði fingið sær skegg, meðan hann var burtur. Eg kendi hann als ikki. Hann sá heilt annarleiðis út, enn tá ið hann fór. Men vit vóru sera glað um at fáa hann heimaftur.

Eina ferð hildu vit hann vera við jólaskipinum, sum fekk burtur í Fugloyarfirði og allir menninir umborð umkomust, men so galið var tað tó ikki.

Vit búði í Havn, meðan kríggið var. Men eg var ofta í Norðradali og vitjaði Charlottu gummu. Hon var fantastisk. Hon arbeiddi alt. Hon mjólkaði, sópaði og hon arbeiddi altíð. Hon var ongantíð í friði. Hon mátti enntá virka sum jarðamóður, tá jarðarmóðurin ikki koma fram. Gumma gjørdist 94 ár. Tá ið hon visti, at hon skuldi doyggja, vildi hon senda boð eftir presti, og var hetta hennara seinasta ynski. Hon er grivin í Kaldbak. Tá var framvegis ikki møguligt at koyra meira enn hálva leiðina. Restin av teininum mátti gangast og kistan mátti berast.

Eg var 14 ár, tá ið vit fóru úr Skopun aftur. Eg fór til nonnurnar at arbeiða, og har lærdi eg heilt fitt av enskum av eini nonnu, sum var frá Fleetwood. Eg lærdi eisini, hvussu ein skuldi gera og ikki gera í Onglandi. Hetta kom væl við seinni. Hetta hevur verið umleið 1937. Eg arbeiddi eisini í fiski eina tíð hjá Karl á Lað.

## Myndatøka við romantikki

Nú koma vit til endan á krígnum, og hesin endi gjørdist heilt øðrvísi enn eg hevði roknað við. Tá er tað, at Harry kemur inn í myndina. Hann hevði á onkran hátt fingið eygað á meg. Men eg hevði slett ikki lagt merki til hansara.

Tá ið kríggið var liðugt marsjeraðu allir ensku hermenninir gjøgnum býin í Havn. Eg var har og tók myndir av skrúgonguni. At taka myndir er ein áhugi, eg havi fingið frá mammu míni, sum var ein íðin myndatakari. Tá Harry sá meg taka myndir, tók hann kjansin og kom til mín og spurdi, um hann kundu fáa nakrar myndir frá mær. Jú, tað var so gaman í! Vit máttu eisini hittast aftur, tá ið filmurin varð framkallaður, so hann kundi fáa sínar myndir.

Soleiðis komu vit at kennast frá fyrstan tíð, og vit byrjaðu at koma saman.

## Harry: Hanna rýmdi..

Hanna rýmdi frá mær einar tvær ferðir, tá ið vit fylgdust í Havn. Tað vísti seg, at hetta var, tá ið hon sá pápa sín, hon vildi ikki, at vit skuldu síggjast saman enn. Hon vildi heldur ikki taka meg til Norðadals, men eg kom kortini til Sund einar tvær ferðir. Tá kom eg at kenna mammubeiggjan Gustav og Helenu, konu hansara. Á ólavsøku hittu vit mammu Hannu, Sannu. Hon var saman við Gustav og Helenu, og hava tey vist eisini tosaði til mín fyrimun við pápan. Eg var framvegis í Føroyum tá, tí allir bretskir hermenn fóru ikki heim aftur beinanvegin, kríggið var liðugt. Teir seinastu støðgaðu til september fyru at rigga alt



*Harry í Italia aftaná kríggið, har hann bert hugsaði um gentuna í Føroyum*

av. Ein góður vinur mín Arthur Sapseed giftist í september við gentu úr Sumba.

Tað kom tann løta, tá ið eg eisini mátti hitta Louis. Tá eg skuldi hitta pápan, varð hurðin bert opnað, og eg varð skumpaður inn. Vit tosaðu væl saman. Eg segði við Louis, at um Jóhanna føldi tað sama fyri mær, sum eg fyri henni, so vildi eg fegin at tað skuldi verða vit bæði. Eg segði eisini pápanum, at eg fór nú avstað av landinum, men eg ætlaði at koma aftur eftir henni. Eg veit ikki, um hann trúi mær ella ikki.

Eg spurdi eisini Honnu, áðrenn eg fór, um hon vildi liva restina av lívinum saman við mær. Hetta vildi hon fegin!

## Varð sendur til Italia

Aftaná kríggið varð eg sendur til Italia og kom at vera í Trieste, nærindis markið til Jugoslavia. Italia var jú ein av taparunum í krígnum, og nú var tað ábyrgdin hjá teimum sameindu at tryggja, at landið kundi verða skipað aftur á einum fólkaræðisligum støði.

Ein partur av hesum var at handa aftur til italienarar hernaðarligar bygningar og flogvøllir og tílíkt, sum bretar høvdu havt ræðið á. Tað er óneyðugt at siga, at hetta var nógv annarleiðis enn í Føroyum.

Har var eg liðugur í juli 1946. Hjá Jóhonnu var einki at gera uttan at bíða her í Føroyum. Í Italia vóru nógvar vakrar gentur, men hjartað lá eftir í Føroyum! Vit skrivaðu eisini saman hvørja viku, meðan eg var har. Onkra glósu man postboðið hava havt, tá ið tað kom við øllum hesum fremmandu brøvunum.

Annars er tað ikki heilt ókent hjá kvinnunum í ættini at giftist við útlendingum. Hjá Sannu vóru tær tríggjar systrar, og tær giftust allar við útlendingum. Tað er tað sama galdandi fyri fleiri døtur hjá beiggjunum.

## Trupult at koma aftur til Føroyar

Eg kom so heim til Onglands úr Italia, og vildi síðan fara heim til Føroyar sum skjótast. Hetta var ikki bert sum at siga tað, tí regluligt samband var jú einki millum londini. Tann einasti møguleiki at sleppa beinleiðis til Føroyar var við fiskiskipum, sum komu við fiski til Bretlands. Hetta var mest til Aberdeen, Grimsby og Hull. Tað var ein annar maður í heimbýi mínum, hetta var norðanfyri Manchester, sum eisini vildi til Føroyar. Eg hitti hann í býnum og kendi hann aftur frá Føroyum, men eg visti ikki hansara navn. Eg segði við hann: "Hevur tú ikki verið í Føroyum?", og hann svaraði játtandi.

Eg segði, at eg vildi fegin til Føroyar til gentuna. Hann vildi eisini sleppa tann vegin, tí hann var giftur í Kvívík. So vit avráddu, at vit skuldu fara til Fleetwood á vesturstrondini í Onglandi. Vit høvdu fingið at vita, at tað vóru føroyskir trolarar væntaðir hagar at landa. Vit fóru til Fleetwood, men har vóru eingir føroyskir trolarar at síggja. Fleetwood var heldur ikki tað mest vanliga staðið, hagar føroysk skip komu. Jóhanna sendi mær so eitt fjarrit um, at føroyskir trolarar vóru farnir til Grimsby at landa. So vit fóru við toki til Grimsby. Vit gistu eina nátt, og fóru so oman í dokkirnar at leita eftir onkrum føroyskum skipi.

## "Tit hava tikið okkara bestu gentur…"

So síggja vit nakrar mans í tuflum og hendur í lumma. Tá sigur mín ferðafelagi: "Eg haldi, at hatta eru føroyingar. Far og spyr teir."